# Trygdarspurningurin ein vaksandi



*Fleiri enn 200 fólk vóru samankomin í Norðurlandahúsinum fríggjadagin at hátíðarhalda 40 ára føðingardagin hjá P/F Elektron. Felagið hevði boðið viðskiftafólkum og øðrum at halda dagin saman við teimum stívliga seksti starvsfólkunum hjá felagnum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Niels Chr. Nolsøe, stjóri á Elektron, sigur, at hann er ógvuliga væl nøgdur við føðingardagstiltakið í Norðurlandahúsinum seinasta fríggjadag, har fleiri enn 200 fólk vóru samankomin at hátíðarhalda 40 ára føðingardagin hjá P/F Elektron**

40 ÁR Á BAKI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta fríggjadag hátíðarhelt stóri KT-veitarin, P/F Elektron, sum nú hevur 40 ár á baki á føroyska marknaðinum, henda merkisdag.

Í sambandi við dagin, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum, hevði Elektron boðið viðskiftafólkum og øðrum at halda dagin saman við teimum stívliga seksti starvsfólkunum, sum starvast hjá felagnum.

Fólk vórðu biðin at møta klokkan 13 hendan dagin til komudrykk og at síggja eina framsýning, sum er í Norðurlandahúsinum um dagarnar.

Hálvan tíma eftir komuna byrjaði sjálvt føðingardagstiltakið í stóra salinum í Norðurlandahúsinum.

## Útveiting

Tað var stjórin í P/F Elektron, Niels Chr. Nolsøe, sum beyð vælkomin og gav orðið til Marner Jacobsen, nevndarformann í P/F Elektron, sum eisini er forstjóri í Føroya Sparikassa.

Marner greiddi í stuttum frá søguni um Elektron, har størstu partaeigararnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsstýri.

Hann greiddi frá teirri stóru menning, sum fyritøkan hevur staðið fyri hesi 40 árini, Elektron hevur verið útbjóðari á føroyska marknaðinum.

Næstur á talarastólin var danin, Erik Preben Hansen, sum starvast hjá Danmarks Teknologiske Institut.

Hann er útbúgving verkfrøðingur og hevur drúgvar royndir innan ymiskar vinnugreinar – í ymiskum londum.

Forum for Outsourcing, sum hoyrir undir Teknologisk Institut í Århus, hevur nevniliga lagt seg eftir at gera donsk virkir dugnaligari at nýta "útveiting" (outsourcing), sum er eitt munadygt amboð til at bøta um kappingarførið hjá fyritøkum.

Erik Preben Hansen, sum er seniorráðgevi hjá Forum for Outsourcing, kallaði sín fyrilestur, "Outsourcing på ledelsens agenda", og í orðinum "útveiting" liggur, at tú gert tað, sum tú dugir best.

Danin heldur, at fyritøkur eiga at halda fast í kjarnuførleikanum og sleppa restini til ein álítandi starvsfelaga, meðan "roknskapartølini enn síggja væl út…", sum hann tekur til.

Eftir at Erik Preben Hansen hevði røtt um tað skilagóða við útveiting, varð stuttfilmurin, "Tann stilla kollveltingin", frumsýndur.

Filmurin lýsir fyritøkuna,




*- Vit eru ógvuliga væl nøgd við føðingardagstiltakið í Norðurlandahúsinum, sigur Niels Chr. Nolsøe, stjóri á P/F Elektron*
*Mynd: Jens Kr. Vang*